# Smáir fimleikarar



Yngri bólkurin, f.v.: Tinna, Silja og Sóley. Húkandi: Fríða, Petur, Jósef og Beinta

**Ikki bert foreldur, men eisini fleiri onnur høvdu leitað sær niða í skúlan í Nólsoy í gjár, har fimleikarar frá trý til tíggju ára aldur høvdu framsýning**

FIMLEIKAFRAMSÝNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Vibeke Joensen*

Tey hava møtt trúliga upp allan vetur.

Trettan børn í aldrinum frá trý upp í tíggju ár hava gingið til fimleik í 20 vikur í vetur, og í gjár var so sluttað av við einari framsýning í fimleikahøllini í skúlanum í Nólsoy.

Børnini vórðu býtt upp í tveir aldursbólkar. Í hesum aldrinum er jú so stórur munur á, hvat eitt tíggju ára gamalt barn kann gera, og hvat eitt tríára gamalt kann.

Tað er Heidi Pedersen, ættað av Bornholm, men búsitandi í Nólsoy, sum hevur havt børnini í fimleiki, og hetta er triðja árið á rað, at hon stendur fyri hesum.

Tað sást á øllum brøgdum, at børnini vóru spent, men eisini eitt sindur smæðin. Onkur av fimleikarunum var enntá so smæðin, at nógvu áskoðararnir gjørdust ov mikið.

Men børnini gingu upp í framsýningina við lív og sál, og stuttligt var at síggja, hvussu væl alt riggaði, serliga tá hugsað verður um motorikkin hjá so ungum børnum.

Rættiliga fitt av fólki var og hugdi at, fyrst og fremst forelsur og familja annars, men eisini onnur, sum ikki høvdu nakað beinleiðis tilknýti til nakað av børnunum.

Talan var um tríggjar seriur, eina fyri eldra bólkin, eina fyri yngra og eina saman.

Framsýningin vardi í hálvan tíma, og aftaná vóru kaffi og køkur til mongu áskoðararnar.

Og børnini – tey vóru vælnøgd, serliga tí tey fingu ein posa av góðgæti í part eftir framsýningina.



Yngstu fimleikararnir, tríára gomlu Jósef og Petur



Eldri bólkurin, f.v.: Emma, Bjørg og Bjørt. Húkandi: Sólja, Rikard og Alda



Bólkarnir gjørdu hvør sína seriu, umframt hesa saman



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo